# GÓÐ TÍÐINDI

Eg kunngeri tykkum stóra gleði,
ið skal verða fyri alt fólkið
Lukas 2.10

NR. 1 / DESEMBER 2022 / ÁRGANGUR 31

# Nær verður friður?

Hesa grein skrivaði Andrew W. Sloan í fyrstu útgávuni av tíðarritinum GÓÐ TÍÐINDI í 1952 – t.v.s. fyri 70 árum síðan. Koreakríggið, sum vardi frá 1950 og til 1953 herjaði, og byrjar Andrew greinina soleiðis:

„Í Korea fara friðarsamráðingar fram, uttan úrslit. Dag um dag tingast menn um vápnahvíld og frið, og hava teir tingast so hesar seinastu mánaðirnar, meðan órógv og ófriður er víða hvar í heiminum og tykist at versna heldur enn at batna."

Nú ófriður og kríggj aftur herja í Evropa, er hóskandi at endurprenta hesa grein.

## Nær verður friður?

Heimurin í dag er fyri mong eins og at búgva á einum virknum gosfjalli, ið kann fara at goysa eld og oyðing uttan um seg og týna alt lív nærhendis.

Ei undur í, um mangur leingist eftir og virkar fyri friði.

## Brotnir friðarsáttmálar

Gjøgnum farnar øldir hava menn virkað fyri at finna grundarlag fyri friði – støðugum friði landanna millum. Menn hava fingið í lag friðarfelagsskapir, sum t.d. hin fyrsta í 1816 í Onglandi, „The Peace Society", í Amerika í 1828, „The American Peace Society" og síðan hitt altjóða „La ligue Internationala de la Paix et la Liberte". – Eisini aðrir felags friðarfundir hava verið hildnir.

Arbeiðið fyri friði hevur verið stýðjað av monnum sum Alfred Nobel við friðarheiðurslønini, somuleiðis av Carnegie grunninum „The Carnegie Endowment for international Peace", sum millum annað lat byggja Friðarháborgina í Haag við sínum 75.000 eintaka stóra bókasavni, sum viðvíkur øllum spurningum í sambandi við frið landanna millum. Men vánaligt hevur úrslitið verið av øllum hesum royndum og tí ómetaliga arbeiði og kostnaði, ið ofraður er fyri hetta annars so góða endamál.

D.R. Davis skrivar í eini av bókum sínum, at síðani ár 1100 e.Kr. hevur Bretland nýtt helvtina av tíðarskeiði sínum til at kríggjast. Fyri hvørji 50 ár við friði hava tað verið 50 ár við kríggi. Hann vísir á, at síðani 1400 f.Kr. hava 8000 friðarsáttmálar verið gjørdir, og at livitíð teirra í miðal hevur verið 2 ár.

## Hvar er Gud?

„Men, hví er tað nú so," spyr onkur. „Er ikki Gud nevndur í Bíbliuni „Gud friðarins" og Kristus nevndur „Friðarhøvdingi"?" – Jú, vissuliga, og eru Teir tað eisini.

Men, hví er tá slíkur ófriður á jørð? Svarið er eyðsæð: „Kann tað vera øðrvísi, tá ið heimurin hevur vent Gudi Friðarins bakið og avnoktað Friðarhøvdinga Hansara?"

Onkur hevur sagt: „Fjøldin av teimum, ið seta fram slíkan spurning, eru menn og



kvinnur, ið ikki vilja vita av Gudi í friðartíð. Tá ið sólin skínur, viðrák er í arbeiðslívinum, og heilsan er góð, er Gud teimum mest sum til ónáðir. Tað sømir seg tí illa fyri slík at gremja seg og siga: „Hví gevur Gud okkum ikki frið aftur?" – tá ið hugburður teirra áður var slíkur! Tey hava klárað seg uttan Gud í sorgleysum tíðum, og nú sannroyna tey, hvussu tað er at vera uttan Gud í royndarstundum.



# Vitnisburður

**Karsten Hansen**

Karsten er føddur í Søldarfirði í 1944, og har vaks hann upp í einum góðum og tryggum heimi.

Karsten gekk saman við systkjunum í sunnudagsskúla, og komu tey eisini á møti sunnukvøld.

14 ára gamal gavst hann í skúlanum og fór til skips. Tað var í 1959 við Fiskanesi, har Poli Johannesen var skipari.

Møtir vóru hildin umborð, men Karsten hugsaði ikki nógv um tað andaliga, hóast hann kom til møtini. Heldur ikki einaferð, tá ið teir rendu á eitt ísfjall og stórur vandi var á ferð, kom ævinleikin honum til hugs.

Karsten sigldi við ymiskum skipum til í 1962, og arbeiddi hann síðan eina tíð á Skála skipasmiðju.

Í 1963 fór Karsten til Danmarkar á real-

– Og fram um alt, hvussu ræðuligt verður tað ikki uttan Gud í ævinleikanum!

Lat tí hvørt einstakt menniskja akta eftir tí, ið hendir uttan um okkum, og taka við læru av tí.

## Friður uttan Friðarhøvdingan?

Gud talar. – Hann hevur talað í tí stilla, síðani harðari og harðari, men tó eru mong menniskju framvegis deyv. Hann fer at tala harðari enn fyri at fáa tey at hoyra.

Men eitt er vist: Ikki verður nakar sannur, varandi friður, hvørki fyri hin einstaka ella millum tjóðirnar uttan Kristus – til Hann fær ræðið.

Ræður Hann í lívi tínum? Er Hann frelsari tín og Harri tín?

Tá ið Kristus var føddur í Betlehem, varð boðað frá „friði á jørð“ (Luk. 2,14), og fer eisini friðarríkið at verða grundað her á fold við Kristusi. Men tað varð ikki opinberað tá, av tí at sjálvur Friðarhøvdingin var vrakaður.

„Kongar jarðarinnar reistust og høvdingar tóku seg saman móti Harranum og móti hinum Salvaða Hansara.“ (Áp. 4,26) – Tí var tað, tá ið Kristus reið inn í komandi kongastað Sín, Jerúsalem, einar 5 dagar áðrenn Hann var krossfestur, at lovsongur lærisveina Hansara ikki longur var um „frið á jørð“, men „frið í Himli“. (Luk. 19,38)

Eingin friður verður á fold, so leingi sum Kristus ikki eigur ræðið – fyrst í teimum einstøku og síðani yvir fólkunum.

Nei, leiðin til frið er ikki at finna í teim 75.000 bindum á bókasavni Friðarháborgarinnar, men í Orði Guds.

## Hevur kristindómurin svikið?

Onkur hugsar møguliga, at kristindómurin hevur svikið, hevur ikki rokkið til, síðan skilið er, sum tað er. – Nei, ófriðurin í heiminum er ikki orsakaður av, at Bíbliunnar læra ikki røkkur til, men tí at Bíbliunnar sannleiki ikki er tikin til eftirtektar av teimum einstøku menniskjunum. Tað er, sum onkur hevur sagt:

„Kristindómurin hevur ikki svikið, men frávera ella trot av kristindómi er orsøkin til skilið, ið er í heiminum í dag. – Og hugsandi menniskju eru so smátt farin at ásanna hetta! Sum Chesterton segði einaferð: „Tað er ikki tað, at kristindómurin er royndur og funnin at vera ov lættur; hann er funnin at vera torførur – og hevur als ikki verið royndur,“ t.e. í heiminum í síni heild.“

Friðarríki Harrans verður einaferð stovnað her á fold, men ikki á tann hátt, ið menn hava virkað fyri og hugsað sær – gjøgnum upplýsing og á ideologiskum grundarlagi. Tann áskoðanin fekk nærum deyðasting sín undir fyrra heimsbardaga.

Nú eru menn aftur farnir at virka fyri „hinum vápnaða friðinum“, t.e. við at halda hvør øðrum skák við makt. – Villdýrið í menniskjanum letur seg ikki temja!

## Stórveldi ganga til grundar

Gud fer tí eisini gera enda á heimsins ríkjum, ið gera mótstøðu ímóti Honum við makt síni. Undirgangur fer at raka tey av hondum Guds. Dániel profetur kunngjørdi hetta á sera grípandi hátt fyri Nebukadnezar, Bábels kongi, tá ið hann týddi honum dreymin um heimsríkini. Hann segði millum annað:

„Tá soraðist sundur alt í einum bæði jarnið, leirið, koparið, silvurið og gullið; tað var sum dumba á treskiplássi um summarið; vindurin tók tað, so einki sást aftur til tað. Men steinurin, ið rakti myndina, varð til stórt fjall, ið fylti upp alla jørðina. – 36: Hetta var dreymurin; og nú skulu vit týða konginum hann. … 44: Og á teimum døgum ið hesir kongar eru, skal Gud Himmalsins grunda ríki, sum í allar ævir ikki skal verða lagt í oyði, og hetta ríki skal ongari aðrari tjóð verða givið í hendur; tað skal sora øll hini ríkini og forkoma teimum, men sjálvt skal tað standa fast í allar ævir – 45: … Hin stóri Gud hevur kunngjørt konginum tað, sum henda skal í framtíðini, og fastur stendur dreymurin, og álítandi er týðingin.“ (Dán. 2,35-36 & 44-45)

Heimssøgan hevur víst okkum, at meginparturin av hesum dreymi er gingin út – og vissuliga skal tað sindrið, ið eftir er, eisini ganga út – innan langt um líður.

***

## Er eingin vón um frið?

Men er tá als eingin friður at finna her á foldum?

Jú, Gudi veri tøkk!

Gud býður mitt í heimsins ófriði einum og hvørjum frið við Seg – harafturat frið í sál og samvitsku, eins væl og frið í sinnið.

Gongur tú framvegis tínar egnu og syndanna leiðir, verður lagna tín, sum orðið sigur: „Men hini gudleysu eru sum havið í ódn; tað fær ikki verið stilt, og bylgjur tess skola upp móru og skarn. – 21: Hini gudleysu hava ongan frið! sigur Gud mín.“ (Es. 57,20-21)

Og fert tú inn í ævina á tann hátt, verður lagna tín í aldur og allar ævir millum teirra, sum Skriftin sigur um: „tey hava ikki hvíld – hvørki dag ella nátt.“ (Op. 14,11)

Tak tí við treytum Guds um frið: „Hevði tú viljað givið boðum Mínum gætur! Tá skuldi friður tín verðið sum áin, og rættvísi tín sum havsbylgjurnar.“ (Es. 48,18)

## Ein friðarins boðskapur

Kristi evangelium verður nevnt „friðarins evangelium“, og meðan heimurin sum heild hevur vent sær burtur frá Gudi, býður Harrin teimum einstøku, ið vilja venda við til Hansara, frið við Seg gjøgnum trúnna á Kristus og blóð Hansara – t.v.s. ígjøgnum frelsuverkið, sum Hann fullførdi fyri okkum við deyða Sínum.

Orðið sigur: „Hann (Gud) gjørdi frið við blóði kross Hansara“ (Kol. 1,20). Hetta er friðarsáttmáli Guds millum syndaran og Seg – ein sáttmáli, sum Gud sjálvur hevur gjørt og góðkent.

Tað eru ikki vit, ið skulu fáa frið í lag við Gud. Tað, ið neyðugt var at gera, er alt liðugt og lagt til rættis av Gudi sjálvum við Harranum Jesusi Kristi. Tað einasta, ið hin ófrelsti syndarin hevur at gera, er at taka við og seta álit sítt á hetta tilboð Guds um frið gjøgnum Jesu Kristi deyða og uppreisn. Tann, ið hevur gjørt hetta, kann siga við Paulusi:

„Rættvísgjørd (t.v.s. fríkend) av trúgv hava vit tí nú frið við Gud við Harra okkara Jesusi Kristi.“ (Róm. 5,1)

## Friðarsáttmáli, ið heldur!

Her er ikki talan um frið uttan um okkum ella innan í okkum. So leingi sum vit eru í hesum ófriðarliga heimi, er mangan ófriður innan í og uttan um okkum. Men hóast hetta eiga vit tó „frið við Gud“, tí einki av øllum hesum innvortis kenslum og útvortis umstøðum kann broyta ella gera til einkis friðarsáttmálan, ið Harrin sjálvur hevur fingið í lag ímillum Gud og syndaran, ið trýr á Jesus.

Tann, ið soleiðis hevur fingið frið í samvitsku sína, hvat syndaskuldini viðvíkur, er nú eisini vorðin barn Guds (Jóh. 1,12), og lærir dag um dag í trúgv at kasta alla sorg sína á Gud, hvat innvortis kenslum og útvortis umstøðum viðvíkur.

Síðan sær hann eisini sannleikan, „at Hann (Gud) hevur umsorgan fyri tykkum“ (1. Pæt. 5,7), og upplivir eisini í dagligum og tímiligum viðurskiftum, at „friður Guds, sum stígur upp um alt vit,“ varðveitir hjørtu og hugsanir hansara í Kristi Jesusi. (Fil. 4,6-7)

At eiga „frið við Gud“, hvat syndaskuldini viðvíkur, og at verða fríur fyri stúran, hvat hesum heimi viðvíkur, er størsta ogn, ið eitt menniskja kann eiga her á fold. Alt er treytað av, at tú tekur móti Kristusi sum tínum persónliga Frelsara.

Tjóðir í bardaga hvør ímóti aðrari kunnu fáa frið í lag, men tað verður bert fyri eitt stutt tíðarskeið; ein friður, gjørdur av menniskjum, kann brótast aftur, áðrenn blekkið í friðarsáttmálanum er tornað. – Tað, sum tær tørvar, er frið í sál tína fyri tíðir og allar ævir.

A. W. Sloan

GÓÐ TÍÐINDI NR. 1

Útgevari: Góð Tíðindi
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Else Sjúrðaberg
Prent: Føroya Prent

## Um blaðið

Fyri júst 70 árum síðan, í november 1952, sá tíðarritið GÓÐ TÍÐINDI fyri fyrstu ferð dagsins ljós, og var tað Andrew W. Sloan, sum tók stig til tað. Tað varð sent ókeypis í hvørt hús í landinum fram til 1972, árið fyri, sum hann andaðist.

Í 1986 tók Poul Færø táttin uppaftur, og gav blaðið út fram til 1995.

Ætlanin er, nú blaðið verður givið út aftur, at tað skal vera á sama grundarlagi sum upprunaliga, og er tað bøn okkara, at tað skal verða til signing fyri alt Føroya fólk.

**John í Skemmuni**

skúlaskeið, og arbeiddi hann eisini niðri eina tíð. Har hitti hann danska gentu, Gull-Britt, sum hann giftist við í 1964.

Í 1966 fór hann á politiskúla í Keypmannahavn, har hann var liðugur í 1967. Síðan flutti hann aftur til Føroya og arbeiddi sum politistur í Havnini í 8 ár. Í 1975 fekk hann arbeiði sum støðleiðari í Klaksvík, og seinni bleiv hann sýslumaður.

Karsten hevur eisini verið í politikki, bæði í Klaksvíkar býráð og í landspolitikki. Hann hevur havt fleiri álitisstørv og varð í 1998 valdur til landsstýrismann í fíggjarmálum. Síðan hevur hann sitið á Føroya løgtingi, og hevur hann verið landsstýrismaður í fýra ymiskum samgongum. Hann gavst í politikki í 2015.

Karsten og Gull-Britt hava búð í Klaksvík tað mesta av tíðini, og búgva tey har enn. Tey eiga 4 børn, 14 abbabørn og 9 langabbabørn.

Karsten hevur luttikið í andaligum arbeiði heilt frá ungum av. Tá ið tey búðu í Havnini, kom hann í Ebenezer og luttók í Bíbliuflokkinum har.

Tá ið tey so fluttu til Klaksvíkar, bleiv hann virkin í Betesda, og kom hann at ferðast nógv saman við Levi Joensen til møtir kring landið.

Karsten er enn virkin, bæði á tí andaliga og tí tímiliga økinum, hóast hann er blivin eldri.

Hann er við til andaktir á røktarheiminum og hevur eisini ábyrgd av trúboðaraskipinum Juvel, sum á hvørjum ári siglir við evangeliinum í Grønlandi.

Í Kalsoynni hevur hann seyð, og bát hevur hann eisini, sum hann er á floti við av og á.

## Karsten greiðir soleiðis frá umvending síni

Eg var størri enn mínir javnaldrar og var tí nógv saman við vinum, sum vóru eldri enn eg. Meðan eg var á Skála skipasmiðju, hevði eg nógvar vinir, og vóru vit nógv í býnum.

Eg hevði avtalað við nakrar vinir, at eg skuldi koma til Havnar á páskum fyri at fara í býin við teimum. Hetta var í 1963. – Men mamma bleiv við at tosa um møtini, sum skuldu verða í Vágum á páskum, og at eg átti at farið vestur at vitja Doru mostur, sum var gift við Dánial Nielsen í Vatnsoyrum.

Mær hevði altíð dámt so væl at koma til Vatnsoyrar um sumrarnar, tí har var so nógv spennandi. Har vóru traktorar og hestar, sum vit sluppu at royna, og har fiskaðu vit síl á vatninum um sumrarnar.

Eg gjørdi av at akta mammu, men avtalaði samstundis við vinir mínar, at eg skuldi koma til Havnar og í býin við teimum 2. páskakvøld.

Eg kom vestur ein mikudag. Dánial bað meg koma at hjálpa sær við at mála nakrar stólar í garasjuni. Meðan eg gjørdi hetta, vitnaði hann fyri mær, men tað bleiv ikki meir enn tað.

Nógv ung komu vestur dagin eftir, og búðu vit saman á loftinum hjá Dánial og Doru í Vatnsoyrum. Møtini vóru í salinum í Sørvági, og var eg gripin av boðskapinum. Men tó, so hugsaði eg meiri um avtaluna, ið eg hevði gjørt við vinir mínar um 2. páskakvøld í Havnini.

Leygardagin fóru vit til Miðvágs at býta traktatir út. Í einum húsi spurdi ein eldri maður okkum um, hvat tað var at vera frelstur. Hin, sum eg var saman við, hevði ikki dirvi at siga nakað, so eg tók mót til mín og greiddi honum frá um Jesus og um frelsuna, sum Hann útvegaði okkum á Golgata. Meðan eg greiddi honum frá hesum, sá eg, hvussu tárini runnu niður eftir kinnum hansara, so gripin var hann. – Og eg var sjálvur ófrelstur!

Møtini hildu so fram leygarkvøldið og sunnudagin og endaðu mánadagin, 2. páskadag, uml. kl 19. Vit skuldu so sigla uml. kl. 21.30 av Miðvági við Pride.

Tá ið vit komu aftur til Vatnsoyrar, og eg skuldi fara upp á loftið at pakka, sá Dánial meg og rópti, meðan hini, sum vóru har, hoyrdu: „Karsten, ert tú ikki frelstur enn?“ – Eg svaraði nei og slepti mær upp á loftið og inn á kamarið. Har legði eg meg á knæ og bað Gud um at frelsa meg, áðrenn eg kom heim aftur. So pakkaði eg og fór niðurundir at fáa mær at eta.

Farið varð síðan til Miðvágs og umborð á Pride. Sum vit sigla, komu Karl Nielsen og Julius Johannesen til mín, og fóru vit fram undir bakkan. Karl hevði hoyrt Dánial rópt á meg, og hevði hann hildið, at eg var frelstur. Nú skiltu teir, at so var ikki, og vitnaðu teir fyri mær. So segði Julius, at hann skuldi fara eftir pápa sínum, Kaj Johannesen.

Kaj kom so at tosa við meg. Vit sigldu tá fram við Kirkjubønesi. Myrkt var, og reisti bergið seg sum eitt bølamyrkur fyri mær, sum vit stóðu tætt frammi undir bakkanum á Pride. Undir samrøðuni endurgav Kaj 1. Jóh. 5.13: „Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at tit skulu vita, at tit hava ævigt lív, tit, ið trúgva á navn Guds Sonar.“

Tá klárnaði fyri mær, og eg fekk frið við Gud og fullu vissu um, at nú var eg frelstur við trúgv á Jesus. Tað var eins og myrkrið veik fyri ljósinum, sum vit sigldu fram við myrka nesinum. – Teir, ið vóru hjástaddir, fóru nú og søgdu hinum umborð, at nú var Karsten frelstur.

Tá ið vit so komu á Havnina, stóðu vinirnir á bryggjuni og bíðaðu eftir mær, men mátti eg siga teimum, at nú vóru umstøður mínar broyttar, og at eg ikki kom við teimum í býin.

Eg gisti so náttina í Havnini, og dagin eftir fór eg inn aftur til Søldarfjarðar.

Eg hevði sett mær fyri, at fyrsta møtið, ið eg fór á, skuldi eg vitna um frelsuna. Páskamøtir høvdu eisini verið í Fuglafirði, og hildu tey fram týskvøldið, og fór eg hagar á møti við tí í hyggju at vitna.

Sum møtið gekk, og givið varð út til vitnisburð, reisti eg meg, men ein annar var fyrr, so eg mátti seta meg aftur. Síðan reisti eg meg aðru ferð, men tá var aftur ein annar undan mær, so at eg mátti aftur seta meg. Men, triðju ferð eydnaðist mær at vitna, har eg takkaði fyri, at eg nú var frelstur við trúgv á Jesus.

Eg ynskti við vitnisburði mínum at gera øllum greitt, hvar eg nú stóð, og frættu allir vinirnir skjótt, hvat ið var hent við mær.

Sama summar var bíbliuskeið á Hafnia, og tá lat eg meg doypa í Ebenezer.

At eg kom til trúgv á Harran sum ungur, hevur havt avgerandi týdning fyri øll viðurskifti í lívi mínum, og havi eg havt nógvar løtur, har trúgv mín hevur staðið sína roynd.

Ynski mítt er, at tú, sum lesur henda vitnisburð, eisini skalt kenna henda sama Frelsaran, Harran Jesus Kristus.

# Góð tíðindi til alt fólkið

Poul Færø skrivar

## Gleðiboð

Tá ið eingil Harrans á náttartíð stóð fyri hirðunum uttan fyri Betlehem, og dýrd Harrans lýsti kring teir, vóru hesi stóru gleðiboð givin allari mannaættini: „Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids“ (Luk. 2,11).

Hesi gleðiboð gjørdust fullkomin við grøvina, tá ið eingil Harrans kundi siga við vitnini, at „Hann er ikki her, Hann er risin upp“ (Luk. 24,6).

Við føðing, lívi, deyða og uppreisn Jesusar vann Hann okkum syndanna fyrigeving og ævigt lív.

## Góð tíðindi

Jú, sanniliga eru hetta góð tíðindi, ið eru til alt fólkið!

Minnist sum unglingi, at Andrew W. Sloan gav út blaðið GÓÐ TÍÐINDI nakrar ferðir árliga í mong ár. Tá ið eg sjálvur var í bestu manndómsárum, untist tað mær í mong ár at geva blað út undir hesum sama heiti, GÓÐ TÍÐINDI.

Tá ið hugurin leitar aftur til hesa tíð, er tað við gleði, tí tað var so spennandi við hesum blaði at sleppa at bera landsmonnum mínum tey bestu gleðiboðini, at Jesus er vinur okkara, og at fíggindskapur okkara við Gud er tikin burtur við bótargerð Hansara á krossinum.

Gjøgnum eitt langt lív havi eg staðfest, at trúgvin, ið okkum er givin av Gudi við endurføðing okkara, altíð heldur og altíð sigrar – í gleði, royndum, freistingum og sorg.

## Lívið í Kristusi

Einasta veruliga lív, sum finst, er lívið í Kristusi. At vakna hvønn morgun og vita, at náði Guds „er nýggj hvønn morgun“ (Sorg. 3,23), og at sleppa at liva í nærveru Harrans dagliga, er størsti framíhjárættur, okkum er tillutaður. Og tað besta er altíð eftir, tí áðrenn vit vita av, er trúgv okkara býtt um við skoðan.

„Vinur elskar altíð“ (Orðt. 17,17), og „sum vinur við vin umgongst Harrin tey, ið óttast Hann“ (Sálmur 25,14). Hesin vinurin, Harrin, er altíð nær, og orð Hansara eru altíð í sinni og hjarta okkara. Vinir umgangast altíð andlit til andlit, og soleiðis umgangast vit Harran, hóast vit ikki síggja Hann á sama hátt, sum vit menniskju síggja hvør annan.

Tað er í hesi nærveru Harrans, at vit øll sum sendiboð Hansara liva tey góðu tíðindi, sum vit hava tikið við. Á tann hátt eru vit góði angi Hansara til hvør annan í øllum lívsins lutum – ein góður angi, sum altíð er „av lívi til lív“ (2. Kor. 2,16).

## Loyst frá umstøðunum

Tey góðu tíðindini eru eisini, at vit kunnu liva loyst frá umstøðum okkara, bundin til ævigu lyfti Guds, sum øll í Jesusi „hava ja sítt“ (2. Kor. 1,20). Uppgáva okkara er hvønn



dag at taka hesi lyfti Guds og gera tey til okkara – tí tey „fáa eisini í Honum amen sítt“ (2. Kor. 1,20).

Tá verður lívið loyst frá umstøðum okkara, frælst og ávakstrarríkt! Sig tí Jesusi ja og heiminum nei, og tú kemur ongantíð at standa yrkisleys/ur í tí verki, ið Gud frammanundan hevur lagt til reiðar, til øll børn Hansara at liva í.

Nú hetta blað GÓÐ TÍÐINDI enn eina ferð verður givið út til alt Føroya fólk, er tað hjartans bøn mín og ynski, at tað, ið tit her kunnu lesa, verður til persónliga signing, tær og landsmonnum okkara at gagni og til frelsu.

Harrin signi hvønn einstakan tykkara – og gloymið ongantíð, at Harrin er nær.


## BÓK UM Andrew W. Sloan




Nú bert:
195,-

Fyri einum ári síðan kom bók í bókahandlarnar, ið nevnist „Andrew W. Sloan – Lív og Læra“. Bókin er í 2 pørtum. Fyrri partur er um lív Andrew Sloans. Í hesum parti eru umleið 80 myndir.

Í seinna parti eru 9 fyrilestrar, sum Andrew helt í Ebenezer í 1960. Bókin telur 540 síður. Tað er forlagið „GÓÐ TÍÐINDi“, sum gevur hana út. Høvundur er John í Skemmuni.

Bókin er at fáa kring landið. Eisini ber til at keypa hana beinleiðis frá forlagnum við at seta seg í samband við høvundan.